# ØLL TOSA UM KARL OVA

KRISTUS, REKLAMUFIDUSUR, NÆSTI NOBELVINNARI, LYGNHÁLSUR, SKALDSLIGT SEXSYMBOL. **ØLL** HAVA EINA MEINING UM **NORSKA** RITHØVUNDAN KARL **OVE KNAUSGÅRD**, SUM HEVUR LAGT **LESARAR** FYRI SÍNAR FØTUR VIÐ EINI **BÓK** UM SEG SJÁLVAN



**BØKUR**

Anna V. Ellingsgaard
anna@sosialurin.fo

Kvinnurnar gána forelskaðar, mannfólkini uppføra seg, sum hava teir endiliga funnið ein vin, ið skilur teir. Ummælarar hava næstan allir lagt seg flatar, meðan einstaku kritikararnir verða buhaðir út

Sum eitt slag av skaldsligari rockstjørnu, hevur 41 ára gamli Karl Ove Knausgård sett norska bókaumhvørvið á hin endan við einum stórverki um seg sjálvan í seks bindum vit heitinum *Min Kamp*. Fyrstu tríggjar bøkurnar komu út í fjør, tann fjóðra kom fyrradagin og tvær tær síðstu eftir ætlan seinni í ár. Meðan høvundurin skrivar um kapp við tíðina, heldur norska tjóðin ondini og fylgir ferðini hjá Knausgård, sum var hann ein modernaður Nansen á veg móti Norðpólinum, vita norsk bløð at siga.

### Beint í búkin

At okkurt heilt sermerkt er í gerð, eru fá í iva um. Júst hvat tað er, er minni greitt. Ein sjálvævisøga, ja, men hvussu sonn er hon? Ella hvat skalt tú kalla eina sjálvævisøgu, sum ger sær dælt av flestu skaldsøgusnildum á einum máli, sum fer beint í búkin á teimum flestu, men á ein hátt, sum fær tey at siga »Hatta kundi eg eisini gjørt«. Samstundis fær verkið summi at tosa um eitt nýbrot fyri skaldsøgukynstrið, meðan onnur ávara um, at *Min Kamp* hevur gjørt skaldsøguhugtakið meiningsleyst.

Hvussu er og ikki, skrivar Karl Ove Knausgård bara um seg sjálvan og sín gerandisliga gerandisdag, har hann flysir eplir, skolar brokkoli, skiftir blæur ella ilskast inn á at ganga og trilla barnavogn í Stokholm – og kenna seg sum eitt mannfólk tikið úr 1800'talinum,



sum stríðist sítt einsamalla stríð móti feminiserað mannfólkaidealinum.

Inn ímillum vendir hann stórum tilveruspurningum saman við góðum vinmonnum, til hann aftur stendur í køkinum og flysir eplir og skolar brokkoli .

Bara tá hann skrivar, kennir hann stóra súsið við lívinum, og ein máti at halda fast í tí kensluni er at skriva um tað at sita og skriva.

### Bók um bókina

Sum nevnt komu fyrstu bøkurnar í røðini út í fjør. Og tá Knausgård jú skrivar um sítt lív merkir tað, at ummælini og nógva kjakið um fyrstu bøkurnar eisini er vorðið eitt av evnunum í seinnu bókunum. Sostatt kann tað meir enn so henda, at teir ummælarar ella journalistar, sum viðgera bøkurnar ella gera samrøður við Knausgård, enda í bókunum. Tað er nevniliga longu hent fyri fleiri. Nú vilja summi so verða við, at hetta eisini er ein orsøkin til, at ummælarar ikki tora annað enn rósa bókunum.

*Eitt slag av »reality-skaldsøgu« kalla summi verkið **Min Kamp** hjá Karl Ove Knausgård, sum hevur sett norska bókaumhvørvið á hin endan*

Hinvegin kann ongin verða vísur í at verða lýstur »rætt«, tí sambært høvundanum, kann hann bara skriva um fólk og hendingar á tann hátt, hann minnist tær. Hetta hevur fingið 14 fólk í hansara familju at venda honum baki í einum skrivi í blaðnum Klassekampen herfyri, har tey vilja vera við, at Knausgård fullur av lygn. Judaslitteratur kalla tey bøkurnar, sum sambært teimum eru á tremur við illgitingum, ósannindum, misvísandi persónslýsingum og úrlatingum, sum greitt eru brot á norska lóg á økinum, halda tey.

### Kritisk pipp

Ein av teimum fáu, sum ikki skilja nógva hóvastákið kring bøkurnar hjá Knausgård, er rithøvundurin Jan Kjærstad. Hann undrast yvir, at *Min kamp* verður hildin fram sum nakað heilt nýtt, tí fleiri høvundar hava longu skrivað líknandi sjálbiografisk verk. Eitt sindur av nýggju klæðir keisarans er yvir tí heila, heldur Kjærstad, men tað er hann ikki komin so langt við. Hann er nevniliga bara øvundsjúkur, halda mong, meðan Knausgård fepurin heldur fram og eftir øllum at døma fær nýggja styrki fyri hvørja av bókunum, sum kemur út.